HB-EB/Streymur:

# Eiga enn mál til góðar

**Á pappírinum man oddaliðið úr HB vera størsti favoritturin hetta umfarið, nú EB/Streymur kemur á vitjan**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Hóast teir nú mugu roknast sum fast innbúgv í fremstu føroysku fótbóltsdeildini, so hevur EB/Streymur enn til góðar at órógva HB, tá spælt verður í Gundadali. Á heimavøllinum á Mølini hevur annars skorist væl í so máta, men enn hava teir á samansetta liðnum ikki fingið somikið sum eitt mál í Gundadali móti teimum reyðu og svørtu.



*Hóast EB/Streymur hevur roynt seg seks ferðir í Gundadali móti HB í bestu føroysku deildini, so eiga teir á felagsliðnum enn til góðar at skjóta mál yvirhøvur í hesum dystum*

**Læna málverja úr B36**

Setningurin hesaferð verður tó at gera nakað við keðiligu hagtølini, men tað ber illa til at siga, at fortreytirnar fyri hesum eru optimalar.

Givnu umstøðurnar hava havt við sær, at tað hevur verið avmarkað við venjingum seinastu vikuna, og hartil skal felagið hava nýggjan málverja, nú Gunnar á Steig sleit hælsinuna. Her er avtala gjørd við Rene Tórgarð um, at hann skal verja málið, men hann kemur undir reglurnar fyri áhugaleikarar, og tí skal hann fyrst hava ein mánað uttan dystir fyri AB, sum hann hevur spælt fyri í ár.

Loysnin her tykist tó vera, at Magnus Poulsen, sum í ungdómsárunum plagdi at kappast við Rene á ymsu B36-liðunum, verður læntur frá B36 í eini tvey umfør. Sum skilst, so eru feløgini komin ásamt um, hvussu hetta skal gerast, og verður spæliloyvið avgreitt á FSF-skrivstovuni fríggjadagin, er helst einki, sum forðar fyri hesi avtaluni.

Í HB hava áskoðararnir kanska ikki verið heilt nøgdir um spælið í øllum dystunum í ár, men úrtøkan hevur tó verið á eini leið. Í øllum førum er meistaraliðið nú at finna har, sum tey vilja halda til, og ongar sum helst ætlanir eru um at sleppa oddasessinum, skilst.

Til dystin hesa ferð hevur HB allar mans tøkar. Páll M. Joensen fer næsta mánaðin at spæla við NSÍ, men við einum Heine Fernandez, sum nú er um at koma fyri seg, skuldi tað neyvan verið nakar trupulleiki hjá HB.

## Odda-brak í aðru deild

Ein av veruligu styrkisroyndunum í kappingini í aðru deild verður á Svangaskarði leygardagin, tá B71 kemur á vitjan hjá B68.

B68 hevur higartil í ár verið flúgvandi, men enn hava teir til góðar at hitta sambiðlarnar til oddasessin, og tí er einki at ivast í, at talan hesaferð verður um veruliga styrkisroynd hjá báðum pørtum.

Samstundis er talan eisini um forsmakk upp á finaluna í kappingini um FSF-steypið, har tey bæði liðini hava vunnið seg fram, eins og talan eisini er um tvey lið, sum við hvør sínum hálvfinaluplássi framvegis hava møguleikan at sleppa upp í part á ólavsøkufinaluni í kappingini um Løgmanssteypið.

Brúdleyp er eisini á Toftum hendan dagin, og tí verður dysturin spældur kl. 19.

-jm

KÍ-GÍ:

# Klassikari í Klaksvík

**Hóast gøtumenn »bert« hava verið fjórðings øld í oddinum av føroyskum fótbólti, so er talan mest sum um klassiska uppgerð, tá GÍ og KÍ takast**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað plagar vanliga at borga fyri góðum undirhaldi, dramatikki og spenningi, tá KÍ og GÍ hittast. Seinastu fjórðings øldina hevur talan verið um hópin av minnisríkum uppgerðum, og tó at hvørki av liðunum í ár tykist vera har, sum tey so oftani hava verið, so man spenningurin vera tann sami kortini. Ikki minst nú bæði liðini hava nýtt seinastu vikurnar til at koma ígongd við at klintra upp eftir stigatalvuni.

**Fráveran**

Tí er lítið at ivast í, at tað eisini hesa ferð fara at savnast nógv fólk kring djúpimýru, og so verður tað upp til spælararnar, hvussu tað fer at hilnast við sjálvari uppgerðini.

Hjá KÍ tykist største ivamálið vera, hvørt Erling Fles fer at verða tøkur. Hann hevur hesar seinastu vikurnar verið offraður á taktiska altarinum, har Ove Nysted hevur verið miðframherji í eini 4-3-3 uppstilling, men tað er neyvan nakar ivi um, at hann er ein góður jokari at hava á liðnum.

Leon Bjartalíð hevur verið sjúkur í vikuni, og tí er eisini nakað ivasamt við honum, meðan Allan Joensen enn einaferð hevur ásannað, at tað kann vera strævið at gera come-back á besta KÍ-liðnum. Hann varð aftur raktur av fipurskaða, tá KÍ seinast spældi, og enn er neyvan hugsingur hjá honum at spæla.

Hjá GÍ fær Krzystof Popczynski ikki sent seg sjálvan á vøllin hesaferð, nú hann er leikbannaður, men í aðrar mátar tykjast allir mans vera tøkir. Tað hevur ivaleyst styrkt um sjálvsálitið, at teir í undirtali megnaðu at basa grannunum úr ÍF seinast, og so er spurningurin, hvørt talan triðju ferð á rað skal gerast um fulla úrtøku.

ÍF-Skála:

## Gongd má á aftur

**Í Fuglafirði eru tey svong eftir stigum, men Skála ætlar sær ikki at sleppa takið á oddliðunum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tá ÍF vitjaði á Skála í triðja umfari í ár, var talan um eina toppuppgerð, sum endaði við einum undirhaldandi og málríkum javnleiki.

Síðani er tó nógv broytt í so máta, og meðan Skála hevur hildið fast um góðu støðuna á talvuni, eru fuglfirðingar skramblaðir niður eftir stigatalvuni seinastu umførini.

Tí er helst einki at ivast í, at landsliðssteðgurin er komin væl við hjá ÍF, og tað tykist eisini, sum hevur venjarin hjá liðnum ikki havt nakað ímóti hesum.

- Tað hevur so í øllum førum givið nøkrum spælarum frið at sleppa av við smásnuddir, so í so máta hevur tað verið fínt við einum steðgi, heldur Petur Simonsen, venjari hjá ÍF.

Hann sigur, at einasti spælarin, sum ikki er tøkur, er John Thomsen, sum hevur verið skaddur seinastu nógvu vikurnar.

Hjá Skála hava skaðar gjørt hampuliga nógv um seg fyrstu umførini. Ikki minst hevur tað verið strævið á miðvøllinu, har venjarin enn hevur til góðar at hava allar mans tøkar undan dysti. Her hevur steðgurin tó eisini givið teimum stundir at fáa nakað av viðgerð og hvíld, og so er spurningurin, hvørt spælarar sum Bjarni Jørgensen og Pauli G. Hansen nú eru komnir heilt fyri seg, ella um tað enn einaferð verður bíða til allar seinastu løtu, áðrenn gjørt verður av, um teir spæla ella ikki.

Í øllum førum er greitt, at Skála eisini ætlar sær fulla úrtøku úr dystinum, og tí kann talan væl gerast um eina heilt undirhaldandi eysturoyaruppgerð.